HELDIN

# Sáttmáli um tænastustig í Heldini, millum “luttakara” og Gjaldstovuna – KT Landsins, hereftir KTL

GJALDSTOVAN

HELDIN

# INNIHALDSYVIRLIT

**INNGANGUR** ........ **4**
Endamál ........ 4
Lýsing av hugtøkum ........ 5
Heldin ........ 5
Vevtænastuveitari ........ 6
Vevtænastubrúkari ........ 6
Luttakari ........ 6
Heldardepilin ........ 6
Samskiftispersónar ........ 7
Fyri luttakarar í Heldini ........ 7
Fyri KTL ........ 7
**ÁBYRGD, SKYLDUR OG TÆNASTUR VEITTAR AV HELDARDEPLINUM (KTL)** ........ **7**
Yvirskipað lýsing av tænastunum ........ 7
Góðkenning av luttakarum ........ 8
Sertifikat og forrit ........ 8
Yvirlit yvir tøkar vevtænastur ........ 8
Tíðarskeið og atgeingi ........ 8
Support ........ 9
Trygdaravritan ........ 9
Yvirvaking ........ 9
Prófvesti ........ 9
**ÁBYRGD OG SKYLDUR HJÁ LUTTAKARUM** ........ **9**
Ábyrgdarin ........ 9
Tøkniligir persónar ........ 10
Yvirskipað lýsing av skyldum ........ 10
Áðrenn íbinding ........ 10
Trygd ........ 10

Dátuflokkingin ... 10
Trygdarambætari og tilknýttar skipanir ... 10
Trygdarhendingar ... 11
Stýring av atgongd ... 11
Brúkaraumsiting og atgongd hjá undirveitarum ... 11
Trygdaravrit ... 11
Útbúnaður ... 11
Menning av forritum ... 12
**PRÍSMYNDIL** ... **12**
**ENDURSKOĐAN AV SLA** ... **12**
**FRÁBOĐAN** ... **12**
**FORCE MAJEURE** ... **12**
**UPPATHALD** ... **13**
**UNDIRSKRIFT** ... **13**

# INNGANGUR

Í rundskrivinum um Heldina er ásett, at ein sáttmáli um tænastustig skal gerast millum KTL og teir myndugleikar, sum ynskja at knýta seg í Heldina. Hesin sáttmáli er tískil gjørdur við støði í ásetingunum í rundskrivinum, og ásetingarnar eru sostatt eisini galdandi fyri teir stovnar og virki, sum skriva undir henda sáttmála.

## Endamál

Endamálið við hesum sáttmála er at lýsa samstarvið millum KTL, sum umsitari og ábyrgdarmyndugleiki av Heldini, og *luttakara*, sum verður knýttur í Heldina. *Luttakarin* fær soleiðis eitt yvirlit yvir tænastur og tænastustig, sum KTL skal veita, og upplýst verður, hvørja ábyrgd *luttakarin* hevur í hesum sambandi.

Broytingar í hesum sáttmála og fylgiskjølum verða viðgjørdar eftir leisti lýstur í yvirskrift 6 í hesum sáttmála.

Hesin sáttmáli fevnir ikki um viðurskifti millum luttakarar í Heldini. Hesi viðurskifti eiga at verða lýst í sínámillum avtalu, sum umfatar m.a. trúnaðarviðurskifti, atgongd til dátur og líknandi.

## Lýsing av hugtøkum

## Heldin

Heldin er eitt tøkniligt undirstøðukervi og ein fyriskipanarligur karmur, sum ger tað møguligt at hava trygt, skipað og brongláð dátusamskifti millum KT skipanir hjá luttakarum umvegis internetið, har samskiftið er prófvfast. Nærri lýsing av Heldini finst á heimasíðuni www.talgildu.fo




*Mynd 1 Yvirskipað mynd av Heldini*

Myndin omanfyri vísir hvussu Heldin er samansett, og hvussu luttakarar eru knýttir í Heldina. Hvør luttakari hevur sínar egnu KT skipanir, sum eru teknaðar sum kassar ovast á myndini. Hesar verða knýttar í Heldina gjøgnum ein trygdarambætara umvegis ein millumambætara. Miðambætarin virkar sum eitt umsetandi lið millum skipaninar og trygdarambætaran. Sirkulin á myndini ímyndar hvar samskiftið fer fram, og hóast tað er teknað sum ein sirkul, so fer samskifti fram umvegis brongláðar tunlar beinleiðis millum tveir luttakarar. Kassarnir til høgru eru kjarnukomponentar, sum halda skil á hvør er hvør í Heldini og senda sertifikatir út til luttakararna, so at brongláða samskiftið er trygt. Niðast eru dømi um ymiskar borgaratænastur, sum kunnu knýtast í Heldina. Niðast til høgru er lyklamiðstøðin fyri samleikaskipanina, sum koyrir í Heldini. Samleikaskipanin er bundin í Heldina, og verður brúkt til at logga á, men er ikki ein innbygdur partur av henni.




*Mynd 2 Staklutir í einum samskifti*

Hesin sáttmálin fevnir bert um viðurskifti millum KTL og *luttakaran* og harvið tær tænastur, sum KTL í hesum sambandi skal veita. Talan er um tann grøna kassan í myndini omanfyri. Myndin vísir hvussu samskiftið millum tveir luttakarar fer fram, og er hetta ein partur av kervinum frá fyrru myndini.

### Vevtænastuveitari

Ein luttakari, ið eigur eina vevtænastu, sum umsitur dátur, sum aðrir myndugleikar kunnu umbiðja, verður umrøddur *vevtænastuveitari.*

### Vevtænastubrúkari

Ein luttakari, ið hevur eina skipan, sum kallar eina vevtænastu hjá einum vevtænastuveitara, verður hann umrøddur vev*tænastubrúkari.*

### Luttakari

Ein *luttakari* er ein almennur myndugleiki[1], kommuna, virki ella felag, hvørs KT skipan(-ir) er knýtt í Heldina, soleiðis at dátur kunnu deilast á ein skipaðan hátt við aðrar myndugleikar, virkir ella feløg í Føroyum, ið eisini eru knýtt í Heldina.

Ein luttakari kann vera bæði vevtænastuveitari og vevtænastubrúkari.

### Heldardepilin

Heldardepilin er samansettur av hesum eindum: Sertifikat umsitingini (CA), miðambætara I & II, yvirvaking og heldarumsitingarskipanini. Hetta eru kjarnulutirnir i Heldini.

[1] Ein almennur myndugleiki er sambært rundskrivi um Heldina aðalráð, stovnar undir teimum, serligir grunnar o.a., umframt sjálvsognarstovnar, sum eru á fíggjarlógini javnbjóðis áðurnevndu almennu myndugleikunum.

## Samskiftispersónar

### *Fyri luttakarar í Heldini*

Samskifti um viðurskifti sambært hesum sáttmála og Heldina fer fram á tveimum stigum: Einum yvirskipaðum og einum tøkniligum stigi.

*Yvirskipaða samskiftið* umfatar t.d. at geva loyvir, knýta í Heldina og útnevna tøkniligar samskiftispersónar, ið taka sær av tøkniliga samskiftinum. Stjórin hevur evstu ábyrgd av yvirskipaða samskiftinum, men kann útnevna ein ábyrgdara av Heldini, ið fær heimild at geva loyvir og útnevna tøkniligar samskiftispersónar, vegna stjóran.

*Tøkniliga samskiftið* umfatar t.d. uppseting av KT og vevtænastu. Ábyrgdarin av Heldini útnevnir tøkniligar samskiftispersónar í umsóknini um knýti í Heldina. Tøkniligir samskiftispersónar kunnu t.d. vera ein innanhýsis teknikari ella ein uttanhýsis veitari av ambætarum. Er ongin tøkniligur samskiftispersónur nevndur, er ábyrgdarin av Heldini sjálvur tøkniligur samskiftispersónur. *Luttakarin* kann hava ymiskar tøkniligar samskiftispersónar fyri hvørja KT skipan/vevtænastu. Samskifti um tøknilig viðurskifti fer ***bert*** fram við hesar ásettu persónarnar, t.e. stjóran, ábyrgdaran av Heldini ella tøkniliga samskiftispersónin, sum gera neyðugu tøkniligu uppsetingina hjá luttakaranum og reka og viðlíkahalda trygdarambætaran.

### *Fyri KTL*

Samskiftið við KTL fer fram gjøgnum KT Skivuna á Gjaldstovuni, KT Landsins, bæði yvirskipað og tøkniligt. KTL hevur innanhýsis skipað arbeiðsuppgávurnar í sambandi við Heldina.

1. *Yvirskipaða samskiftið* umfatar t.d. at gera SLA avtalu, góðkenningartilgongd av luttakarum og vanliga umsiting av Heldini.
2. *Tøkniliga samskiftið* umfatar t.d. hjálp til uppsetan og íbinding av trygdarambætara og vevtænastu og stovnan av sertifikatum. Samskifti um tøknilig viðurskifti fer ***bert*** fram við ásettu persónarnar, t.e. stjóran, ábyrgdaran av Heldini ella tøkniligar samskiftispersónar, sum eru skrásettir í HU (Heldarumsitingarskipanin).

# ÁBYRGD, SKYLDUR OG TÆNASTUR VEITTAR AV HELDARDEPLINUM (KTL)

## Yvirskipað lýsing av tænastunum

Veitingarnar í tænastuni eru:

- Trygt, bronglað samskifti millum luttakarar í Heldini

- Eitt yvirlit yvir tøkar vevtænastur
- Support í sambandi við íbinding og rakstur av trygdarambætara
- Yvirvaking av trygdarambætarum hjá luttakarum
- Trygd fyri at samskifti gjøgnum Heldina er próvfast

KTL hevur skyldu at tryggja, at omanfyri nevndu tænastur verða riknar á tryggan hátt.

KTL hevur tó ikki endurgjaldsábyrgd fyri møguligum beinleiðis ella óbeinleiðis tapi, sum luttakarar kunnu hava av nýtslu - ella vantandi nýtslu - av Heldini.

## Góðkenning av luttakarum

Tann, ið ynskir at gerast luttakari í Heldini, skal hava eitt virkið V-tal. Tá søkt verður um íbinding, kannar KTL upplýsingarnar í umsóknini, t.d. um navn á luttakaranum og V-tal er rætt. Útflýggjan av sertifikati og endaliga íbindingin er treytað av, at upplýsingarnar eru rættar.

## Sertifikat og forrit

Sum høvuðstáttur í trygdini í Heldini veitir KTL sertifikat og forrit, sum eyðmerkja luttakarar og bronglar samskifti millum hesar.

Tað er grundleggjandi fyri trygdina í Heldini, at allir luttakarar lúka nøkur trygdarkrøv. Krøv til trygdina hjá luttakarum í Heldini eru nærri lýst í fylgiskjalinum "Trygdarkrøv"

## Yvirlit yvir tøkar vevtænastur

Allir luttakarar, vevtænastur, KT skipanir, trygdarambætarar og ábyrgdarpersónar hjá luttakarunum í Heldini, verða skrásettir í Heldarumsitingarskipanini (HU). Skipanin vísir yvirlit yvir tøkar tænastur, og hetta yvirlitið er alment á www.heldin.fo

KTL viðlíkaheldur Heldarumsitingarskipana.

## Tíðarskeið og atgeingi

Atgeingi til Heldina skal vera á slíkum stigi, at tænasturnar, sæð yvir eitt 30 daga samanhangandi tíðarskeið[2], eru tøkar 99.5% av tíðini. Hetta verður nevnt nýtslutíðin[3].

Netsambondini hjá *luttakarum,* tað veri seg SamNet hjá *luttakaranum* sjálvum, internetsambandið ella onnur viðurskifti hjá luttakarum, sum kunnu ávirka atgeingið, verða ikki roknað uppí nýtslutíðina.

---

[2] *Landsnet kann út frá hesum vanta atgeingi í góðar 3,6 tímar fyri hvørjar 30 dagar (30 dg. x 24 t. * 0,005 = 3,6 t.).*

[3] *Nýtslutíð svarar til danska heitið 'oppetid', og er tíðin í % tá skipanirnar eru atkomiligar.*

## Support

Allar fráboðanir um feilir, hjálp og trupulleikar skulu verða beind til KT Skivuna, við at senda teldubræv til heldin@gjaldstovan.fo ella við at ringja til 352400. Tað ber eisini til at fara inn á www.talgildu.fo/heldin at spyrja og lesa spurningar/svar hjá øðrum.

KT Skivan hevur opið (vanliga arbeiðstíð)

Mánadag - hósdag 8.00 - 16.00

Fríggjadag 8.00 - 15.00

Uttanfyri vanliga arbeiðstíð er telefonvakt til bráðfeingis trupulleikar. Tlf. 352490

## Trygdaravritan

Tað eru tvey sløg av trygdaravritan í Heldini, annað av Heldardeplinum, sum KTL hevur ábyrgdina av, og hitt av trygdarambætarum hjá luttakaranum, sum luttakarin sjálvur hevur ábyrgdina av.

KTL ger stakroyndir av avritum av Heldardeplinum.

## Yvirvaking

KTL yvirvakir trygdarambætararnar hjá luttakarunum og Heldardepilin. Metir KTL, at álvarslig trygdarbrot eru framd, t.d. talgild álop, virus, hakking o.s.fr., hevur Gjaldstovan heimild at fremja tey trygdarinntriv, sum mett vera neyðug t.d. at nokta viðkomandi myndugleika atgongd til Heldina, til viðurskiftini eru komin í eina trygga legu aftur.

## Próvfesti

KTL skal tryggja at samskiftið í Heldini er próvfast. Hetta verður gjørt við at Heldardepilin savnar inn gerðalistar (loggar) og MD5 samanteljingar av øllum samskifti. Hervið kann staðfestast hvat veruliga er farið fram.

# ÁBYRGD OG SKYLDUR HJÁ LUTTAKARUM

## Ábyrgdarin

Stjórin, ella ein av stjóranum útnevndur persónur, hevur yvirskipaðu ábyrgdina av teimum pørtum av Heldini, sum stovnurin varar av, t.d. trygdarambætara og vevtænastu, sí annars kapittul 1.4 Samskiftispersónar, omanfyri.

## Tøkniligir persónar

Ábyrgdarin av Heldini útnevnir ein ella fleiri tøkniligar persónar, sum hava ábyrgdina av tekniska samskiftinum, sí annars kapittul 1.4 Samskiftispersónar, omanfyri.

## Yvirskipað lýsing av skyldum

Luttakarin hevur skyldu til at tryggja:

- Rakstur av egnum trygdarambætara
- At flokking er framd sambært vegleiðingina um trygdarflokking
- At trygdaravrit verður gjørt av trygdarambætara
- Skipanir, teldur og net eru trygt uppsett eftir galdandi forskriftum

## Áðrenn íbinding

Luttakarin skal flokka dáturnar í teimum KT skipanum, sum skulu knýtast í Heldina.

Um ein luttakari er vevtænastuveitari, eigur hesin at lýsa endamálið, markamótið (interface) og funktiónina við vevtænastuni, og lata tað inn saman við umsóknini um íbinding. Luttakarin eigur eisini at kanna, um ein líknandi vevtænasta finst frammanundan, og um so er, heldur gera nýtslu av verandi vevtænastu. Meginreglan er, at ein ávís vevtænasta bert eigur at vera til staðar eina ferð í Heldini.

## Trygd

### *Dátuflokkingin*

Dátuflokkingin fer fram sambært fylgiskjalinum “Trygdarkrøv”

Trygdarambætarar og KT skipanir hjá vevtænastuveitarum skulu flokkast. Trygdarambætarin verður flokkaður eftir tí trygdarstigi sum KT skipanin, sum verður knýtt í trygdarambætaran, hevur. Eru fleiri ymiskar skipanir við ymiskum trygdarstigi íbundnar trygdarambætaran, skal trygdarambætarin flokkast eftir teirri skipan við hægsta trygdarstigi.

Tað er uppgávan hjá luttakarunum, at avtala trygdarstig sínámillum, um serlig trygdarviðurskifti gera seg galdandi.

### *Trygdarambætari og tilknýttar skipanir*

Luttakarin hevur einsamallur ábyrgdina av trygdini á trygdarambætaranum, bæði tá talan er um fysiska trygd, brúkaraatgongd og herðing. Somuleiðis hevur luttakarin ábyrgdina av at tryggja samskiftið millum trygdarambætara og KT skipan. Luttakarin eigur at umhugsa at

seta serlig tiltøk í verk í hesum samskifti, t.d. bronglað samskifti við SSL lyklum og/ella bert at loyva ávísum IP adressum atgongd.

Meginreglan er, at ein luttakari bert hevur loyvi at binda sínar egnu skipanir í sín trygdarambætara. Ynskja luttakarar at víkja frá hesari meginreglu, skulu teir venda sær til KTL við hesum fyrispurningi.

KTL kann veita support í samband við trygdaruppsetingina.

### *Trygdarhendingar*

Gerst myndugleikin varugur við, at møgulig trygdarbrot eru framd á kervi ella skipanir tess, t.d. trygdarbrek, álop, hakking o.s.fr., skal myndugleikin alt fyri eitt boða KTL frá hesum.

### *Stýring av atgongd*

Ein vevtænastuveitari hevur sjálvur ábyrgdina av at stýra atgongd og rættindum hjá vevtænastubrúkarum. Tað er ábyrgdin hjá vevtænastuveitaranum, at avgera hvussu neyv stýringin skal vera.

### Brúkaraumsiting og atgongd hjá undirveitarum

Av tí at atgongdin til vevtænastur verður stýrd í trygdarambætaranum hjá luttakaranum, so hevur tað avgerandi týdning, at atgongdin til hendan er strangt avmarkað.

Luttakarin skal boða KTL frá broytingum við heldarábyrgdarum og tøkniligum samskiftispersónum.

### Trygdaravrit

Tað er ábyrgdin hjá luttakaranum at taka trygdaravrit av sínum egna trygdarambætara og at hava mannagongdir til at endurskapa trygdarambætaran. Tað er týðandi, at luttakarin eisini hevur eitt dagført yvirlit yvir, hvussu trygdarambætarin er settur upp, og hvørji loyvir eru givin.

## Útbúnaður

Luttakarin hevur ábyrgdina av, at útbúnaðurin er í nóg góðum standi og svarar nóg skjótt og skal eisini halda viðlíka og umvæla tøkniliga útbúnaðin um neyðugt. Hetta umfatar internetsamband, firewall, lokalt net, trygdarambætara, vevtænastuambætara og annan útbúnað til rakstur av KT kervinum hjá luttakaranum.

**Menning av forritum**

Forrit, sum verða ment til Heldina, skulu fylgja standardinum, sum er lýstur í skjalinum "Vegleiðing til gerð av vevtænastu" á www.talgildu.fo/heldin.

Mælt verður til, at luttakarar seta seg í samband við KTL áðrenn farið verður í gongd at menna eina vevtænastu. Vevtænastur verða meldaðar til Heldina við at útfylla eitt oyðublað og senda tað til heldin@gjaldstovan.fo saman við lyklafílu frá trygdarambætara, WDSL fílu og lýsing av skipan.

# PRÍSMYNDIL

Tað er ókeypis hjá almennum myndugleikum at knýta í og brúka Heldina. Allar aðrar útreiðslur, so sum menning av vevtænastum, uppseting og rakstur av trygdarambætara, gjalda allir luttakarar sjálvir fyri.

Tað er somuleiðis ókeypis fyri kommunur, virkir og feløg at knýta í og brúka Heldina. Um neyðugt, tilskilar KTL sær, í einum framtíðar høpi, rætt til, við eini 6 mánaðar fráboðan, at krevja eitt íbíndingar- og/ella rakstrargjald. Tó í mesta lagi so mikið at gjaldið samsvarar tær útreiðslur, KTL hevur hesum viðvíkjandi.

# ENDURSKOÐAN AV SLA

Hesin SLA og tilhoyrandi fylgiskjøl kunnu broytast av KTL og einum umboðandi toymi fyri luttakarar í Heldini, í felag. Broytingar verða gjørdar um grundtænastan ella tænastustigið verða broytt.

# FRÁBOÐAN

KTL hevur skyldu at boða luttakaranum frá, um feilir ella broytingar eru, ið kunnu ávirka arbeiðið hjá luttakaranum. Hetta verður gjørt við at senda luttakaranum teldubræv ella, í meira átrokandi førum, við at ringja til luttakaran.

# FORCE MAJEURE

Hvørki KTL ella luttakarin kunnu ábyrgdast fyri at avtala ikki verður uppfylt til tíðina, tá atvoldin er eitthvørt, sum partarnir ikki hava ávirkan á.

## UPPATHALD

Um luttakari ynskir at taka seg úr Heldini, skulu skrivlig boð sendast til KTL, ið tekur neyðugu loyvini aftur, so luttakarin gert óvirkin. Tað er ábyrgdin hjá luttakaranum, at fráboða teimum luttakarum, sum hann letur ella fær dátur frá, um uppathald.

## UNDIRSKRIFT

Fyri ___________________________________ V-tal: _____________

Navn: _________________________________ Dagfesting: _____________

Undirskrift: __________________________________________

Fyri KT Landsins

Navn: _________________________________ Dagfesting: _____________

Undirskrift: _____________________________________